

*Leguhúsið hevur eina stóra hoppipútu, reiggjur, klatriborg og fótbóltsvøll – og eisini kemur stóra bamsan á vitjan*

# 1700 vitja

**- Tiltakið hjá okkum "Kom og hav tað stuttligt í Nesvík" er ikki av andaligum slag. Hetta er eitt átak, har vit vilja vísa húsið fram og vísa á teir møguleikar, sum eru í Nesvík, sigur Sólbjørn Jensen, sum er við í einum verkætlanarbólki, ið hevur savnað hópin av børnum og vaksnum í Nesvík**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leguhúsið í Nesvík hevur í vár og nú tíðliga í summar sett á kjøl eitt átak, ið hevur til endamáls at kunna um teir møguleikar, sum liggja í stóra og góða húsinum í Nesvík.

Við boðskapinum "Kom og hav tað stuttligt í Nesvík" hevur leguhúsið bjóðað barnagarðsbørnum í aldrinum 3-7 ár saman við námsfrøðingum at vitja í Nesvík. Skipað er soleiðis fyri níggjum døgum tilsamans – frá seinast í mars til tíðliga í juni – har stívliga 200 børn og námsfrøðingar hvønn dagin fáa eina kunning um húsið og hava tað stuttligt í Nesvík.

Tiltakið, sum er ókeypis, er sera væl umtókt, og tá hesir níggju dagarnir eru lagdir aftur um, hava eini 1700 barnagarðsbørn og umleið 300 námsfrøðingar vitjað í Nesvík.

Dagurin í leguhúsinum byrjar við, at gyklarin Ásbjørn Berthelsen undirheldur, einir 2-3 sangir verða sungnir, og tá ið matpakkin, sum børnini hava við sær, er etin um mid-



*Tey hugna sær óført uttandura...*